# Spentar stjørnur
# TIL US OPEN

Stóra amerikanska tenniskappingin US Open endaði um vikuskiftið, og tað var ikki bert á vøllinum, at stjørnur vóru at sigga. Eisini á áskoðaraplássunum vóru kend fólk til finalurnar hjá kvinnum og monnum.

Hjá kvinnum var tað Kim Clijsters, sum vann kappingina, og hjá monnum stríddist tann 35 ára gamli Andre Agassi óført ímóti favorittunum Roger Federer, men tað var til fánýtis, tí sveisarin vann dystin 3-1 í sett-um.

Tað var serliga tær løturnar, tá ið tað gekk væl hjá amerikumaninum Agassi, at áskoðararnir vóru lívligir, og eisini stjørnur sum Robin Williams, Nicole Kidman, Cliff Richard og Courtney Cox Arquette fylgdu spent við dystinum.



Sjónleikarin Nicole Kidman var spent, tá ið menninir dystaðust sunnukvøldið



Sjónleikarin Robin Williams hugnaði sær ófort á áskoðaraplássunum, meðan bretski Cliff Richard, sum sæst til vinstru á myndini, situr friðarligur og hyggur eftir dystinum.

Myndir: Scanpix



Sjónleikarin, sum gjørdist kend í sjónvarpsrøðini Friende, Courtney Cox Arquette, kom til finaluna saman við eini vinkonu



Idina Menzel sang amerikanska tjóðsangin áðrenn finaludystin millum Federer og Agassi sunnukvøldið

## HITLIST

### 15 tær bestu (ÚF)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | James Blunt | You're Beautiful |
| 2 | Kim Hansen | Maria |
| 3 | Nephew | Worst/Best Case Scenario |
| 4 | Páll Finnur Páll | Herbergið |
| 5 | Orkestriiið har vestriii | 1 Veit iii |
| 6 | Nephew | En Wannabe Darth Wader |
| 7 | Green Day | Wake Me Up When September Ends |
| 8 | Bon Jovi | Have a Nice Day |
| 9 | Anna David | Fuck Dig |
| 10 | U2 | City of Blinding Lights |
| 11 | Coldplay | Fix You |
| 12 | Høgni Lisberg | Morning Dew |
| 13 | Black Eyed Peas | Don't Lie |
| 14 | 200 | Mamma |
| 15 | Anastacia & Ben Moody | Everything Burns |

### Tjeklisten (DR)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | James Blunt | You're Beautiful |
| 2 | Green Day | Wake Me Up When September Ends |
| 3 | Kashmir | The Curse of Being a Girl |
| 4 | Tue West | Tankespind |
| 5 | Sterling | Ubesvaret Opkald |
| 6 | Amy Diamond | What's In It For Me |
| 7 | Daniel Powter | Bad Day |
| 8 | Mew | Apocalypso |
| 9 | Gorillaz | Dare |
| 10 | Johnny Deluxe | Det Du Gør |
| 11 | Anna David | Fuck Dig |
| 12 | Texas | Getaway |
| 13 | Juncker | Hvis Din Far Gi'r Dig Lov |
| 14 | Gwen Stefani | Cool |
| 15 | Sisse Marie | Boom |
| 16 | Christian Walz | Wonderchild |
| 17 | U2 | City of Blinding Lights |
| 18 | Britney Spears | Someday |
| 19 | Black Eyed Peas | Don't Lie |
| 20 | Rasmus | No Fear |

### Top of the Pops (BBC)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Pussycat Dolls ft. Busta Rhymes | Don't Cha |
| 2 | Gorillaz | Dare |
| 3 | Mylo vs. Miami Sound Machine | Doctor Pressure |
| 4 | Coldplay | Fix You |
| 5 | Daniel Powter | Bad Day |
| 6 | Rihanna | Pon De Replay |
| 7 | Oasis | The Importance Of Being Idle |
| 8 | David Gray | The One I Love |
| 9 | Simon Webbe | Lay Your Hands |
| 10 | Jessica Simpson | These Boots Were Made For Walking |
| 11 | Black Eyed Peas | Don't Lie |
| 12 | KT Tunstall | Suddenly I see |
| 13 | Les Rhymes Digitales | Jaques Your Body |
| 14 | Goldie Lookin Chain | Your Missus Is a Nutter |
| 15 | Gwen Stefani | Cool |
| 16 | Kaiser Chiefs | I Predict a Riot |
| 17 | Faithless | Insomnia 2005 |
| 18 | James Blunt | You're Beautiful |
| 19 | Arcade Fire | Rebellion |
| 20 | Ian Brown | All Ablaze |

### Billboard

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Kayne West ft. Jamie Foxx | Gold Digger |
| 2 | Mariah Carey | Shake It Off |
| 3 | Missy Elliot og fleiri | Lose Control |
| 4 | Mariah Carey | We Belong Together |
| 5 | The Pussycat Dolls | Don't Cha |
| 6 | Bow Wow ft. Ciara | Like You |
| 7 | Rihanna | Pon de Replay |
| 8 | Fall Out Boy | Sugar, We're Goin' Down |
| 9 | Bow Wowo ft. Omarion | Let Me Hold You |
| 10 | Lifehouse | You And Me |
| 11 | Green Day | Wake Me Up When September Ends |
| 12 | D.H.T | Listen To Your Heart |
| 13 | Kelly Clarkson | Behind These Hazel Eyes |
| 14 | The Black Eyed Peas | Don't Lie |
| 15 | Weezer | Beverly Hills |
| 16 | The Black Eyed Peas | My Humps |
| 17 | Gorillaz | Feel Good Inc. |
| 18 | David Banner | Play |
| 19 | Ludacris ft. Bobby Valentino | Pimpin' All Over The World |
| 20 | The Click Five | Just The Girl |



## TIMBERLAKE GER FILM

Poppstjørnan Justin Timberlake skal nú royna seg á hvíta tjaldinum. Hann ger í hesum døgum upptøk-ur til filmin Southland Tales í Santa Monica í California. Timberlake hev-ur fingið eitt tilgjørt arr í andlitið, men tað sigst, at konufólkini, sum vóru til upptøkurnar, vóru líka býttar í honum fyri tað. Innan leingi fæst so at vita, um Timberlake hevur somu eydnuna á hvíta tjaldinum, sum hann hevur havt á palli og á fløgu.

(Mynd: mavrixphoto.com)

## ALEXANDRA VIÐ SMÍLI

Ein stórsmílandi Alexandra prin-sessa setti mánadagin Køben-havns Internationale Filmfestival fyri børn og ung. Festivalurin hevur miðstøð í Palads Bio, og hesa vikuna verða tað sýndir spælifilmar til børn og ung í fýra biohøllum í Keypmannahavn. Alexandra prin-sessa hevur verið nógv frammi í Danmark, síðani tað er komið fram, at hon hevur fingið sær ein nýggj-an sjeik eftir skilnaðin frá Joachim prinsi. Um tað var tí, at smílið var so stórt mánadagin, sigur søgan einki um.

(Mynd: Keld Navntoft/Scanpix)



## SEND OKKUM MYNDIR AV TÆR OG TEIMUM KENDU

Planet.fo vil nú hava fólk at senda myndir inn, har tey hava hitt onkran kendan persón. Hevur tú hitt eina poppstjørnu, ein kendan fótbóltsspælara, sjónleikara, politikara ellan annan navnframan persón, so vilja vit gjarna hava teg at senda okkum myndina.

Myndirnar kunnu sendast saman við nøvnunum á persónunum á myndini og stuttari frágreiðing um myndina til planet@sosialurin.fo

Myndirnar verða síðani at sigga á heimasíðuni Planet.fo, sum er føroyski ungdómsportalurin, og onkrar verða eisini at siggja í Planet-blaðnum í Sosiali-num.